

*- Eg kenni meg drignan av norrønu mentanini, seigginum í fólkinum og málsliga lyndinum at gera ov lítið av, sigur skaldið Seamus Heaney, sum vitjar á Listastevnuni mánakvøldið*

írska málinum. Tvørturímóti. Mín tilvitan um alt hatta verður bara djúpri, sum eg gerist eldri.

*Hvat upptekur teg sum yrkjara í løtuni?*

- Eg arbeiði við einum yrkingasavni, sum eftir ætlan kemur út seinni í ár. Savnið byrjar við nøkrum yrkingum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis endurspegla hetta at liva ‘í eini myrkari tíð’. Eg skrivi út frá minnunum um ein barndóm, langt burturi frá ræðuleikunum í 2. heimsbardaga, men eg royni at flyta meg frá teimum minnunum inn í nýggju óunniligu støðuna í okkara hóttu 21. øld, har nógv av okkum liva langt burturi frá vandanum, men kortini eru nívd av kensluni av, at "alt kann henda."

Eitt annað tema í savninum er endurnýggjan, bæði í persónligum og almennum høpi. Samanumtikið snýr savnið seg um at vinna styrki í royndini at standa stinnur, um tað støðufestið og frælsið, ið kann koma av at minnast - og sjálvt av missi.

## Tað norrøna dregur ...

*Á Listastevnuni fert tú at bera tínar yrkingar fram saman við pípuleikaranum Liam O’ Flynn. Hvat følir tú, at píputónleikurin gevur tínum yrkingum?*

- Írskur píputónleikur er ómetaliga hábærsligur við sterkum undirtónum av sorg. Serliga í stillu tónaløgunum og harmaljóðunum. Og tað er okkurt ótrúliga tignarligt og átreingjandi við spælinum hjá Liam O’ Flynn. Hann er ein meistari á tann hátt, at áhoyrarnir kenna seg tryggar og til reiðar at geva seg yvir, til at dagdroyma í samljóði við tónleikin. Og tá tónleikurin heldur uppat, eru oyrað og sinnið friðsæl og opin. Tøgnin er sum moldin, ið er velt og saksað, klár at verða sádd við orðum.

*Sum eg skilji, verður framførslan á Listastevnuni tykkara einasta í ár, og at tað er tín áhugi í Føroyum, sum hevur fingið tykkum higar. Hvaðan stavar hesin áhugin?*

- Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri nørrønu mentanini og fólkinum. Eg kenni meg drignan at skaldskapinum, seigginum í persónunum og málsliga lyndinum at gera ov lítið av. Berir klettar, heiðalendi, bøvegir og heimrust hava altíð nomið okkurt í mær. Tá BBC vildi hava meg við í teirra Desert Island sendingum, segði eg við vertin, at eg vildi heldur hava seyð og fjørugrót á míni oydnu oyggj, enn strendur og dadlupálmar. Vinur mín Sean Sweeny, sum er føroyavinur og eisini dugir føroyskt, hevur altíð biðið meg farið. So eg gleði meg nógv. Eg elski okkara egnu Aran oyggjar, Orknoyggjarnar og Ísland, og frá fyrstan tíð hevur bara navnið "Faroes" í veðurtíðindunum á BBC altíð havt okkurt gátuført, mjørkakent og lokkandi yvir sær.